# Ítróttarfelag Fuglafjarðar



# ÍF - LÍF

HAVSBRÚN

LANDSKAPPING

Leygardagin 10. august 2002

Kl. 15.00 í Fuglafirði

Multiport

## TORSHIPPING

**Umfatandi skipatænastur á einum stað**



Skipamekling

**Keyp og søla av skipum á altjóða skipamarknaðinum.**



Skipaføkstur

**Rakstur av skipum í Føroyska Altjóða Skipaskránni.**



Skipaumboðan

**Dygdargóð tænasta til skip í føroyskum havnum, alt samdøgrið.**

Niels Finsensgøta 23 · P.O. Box 1252 · FO - 110 Tórshavn · Faroe Islands · torship@post.olivant.fo · www.torship.com

PUMA

**Cellerator GCI I FG**

Stødd: 6-11+12

**1.499,-**



**King GC FG JR.**

Stødd: 28-35

**499,-**



**Volante GC I FG JR.**

Stødd: 28 - 35

**499,-**



## P/F THOMAS DAM

ÍTRÓTTUR á Glyvrum - Glyvravegur - Glyvrar - tel.44 73 99 - fax 44 73 97

ÍTRÓTTUR - N. Finsensgøta 5 - FO-110 Tórshavn - tel. 355 300



## BAADER®

Vit hava hópin av eykalutum til BAADER-maskinur á goymslu.

Nú umboða vit eisini Fomaco saltsproytur.

## P/F Petur Larsen



# ÁRSINS
## ÍF´ARI 2002

## JOHN AFTUR DAGSINS MAÐUR. HESAFERÐ ÍMÓTI HB



Í 1-4 tapinum ímóti HB seinast, vóru ikki nógvar atkvøður. John fekk flestar, meðan bróðurin Mortan lá beint í hølunum við trimum færri. Umframt teir báðar fekk Eyðolvur nakrar atkvøður.

John fekk tí aftur hesaferð ein døgurðabita fyri tvey frá Pól á Muntra. Vit ynskja honum tillukku, og spyrja, hvørjum hann nú bjóðar við??.....

### Atkvøðutal

| | ÍF-HB | Íalt |
|---|---|---|
| John Thomsen | 15 | 111 |
| Mortan Thomsen | 12 | 66 |
| Eyðolvur R.-Petersen | 3 | 86 |
| **Samlaða støðan:** | | |
| John Thomsen | | 111 |
| Eyðolvur R.-Petersen | | 86 |
| Høgni Zachariassen | | 70 |
| Mortan Thomsen | | 66 |

Atkvøtt verður til allar heimadystirnar í landskappingini ella íalt 9. Tann leikari, sum veljarin heldur hevur spælt best, fær 5 stig, næstbesti 3 stig og triðbesti 2 stig.

Atkvøðuseðlarnir fáast í ovaru hæddini í Ítróttarhúsinum. Seðilin her á síðuni kann eisini nýtast. Hvør veljari hevur bert loyvi at lata ein seðil inn til hvønn dyst.

### VINNINGAR

- Ársins ÍF´ari fær 1.000,-
- Nr. 2 fær 500,-
- Nr. 3 fær 500,-

Fa. Eilif Arge í Klaksvík letur prýðislutir til nr. 1, 2 og 3.

Restaurant Muntra letur sunnudagsdøgurða fyri tvey til besta leikaran í hvørjum av landskappingardystunum í ár.

Restaurant Muntra

Tá kappingarárið er av, verður lutakast millum allar atkvøðuseðlarnar um eitt krov frá Haraldsen.

**HARALDSEN**
- títt keyp -

## Atkvøðuseðil

Dystur:______________

Nr. 1 (5 stig):______________

Nr. 2 (3 stig):______________

Nr. 3 (2 stig):______________

*Atkvøðuseðilin skal latast inn í ovaru hæddini í ÍF-húsinum seinast 15 min. eftir loknan dyst.*

Veljari:______________ Tel.:______________





### TOPPDYSTUR
# ÍMÓTI GRANNUNUM Í DAG

**Besta liðið hjá grannunum í Leirvík er á vitjan í dag. Talan er um toppdyst, sum vit skulu vinna.**

Eftir at verið ovurfóðraður við fótbólti til fyrst í juli, hevur nú steðgur verið í í góðan mánaða. Men nú er so gongd komin í aftur. Okkara menn hava leikt ein dyst í seinnu hálvu, og tað hava kappingarneytar okkara eisini gjørt. Hvussu tað hevur gingist, vita vit á leikskránni av góðum orsøkum ikki.

Men í dag hava vit vitjan av grannunum úr Leirvík. Seinast vit hittust, var í Leirvík 11. mei. Tá gjørdu leirvíkingar bart, og ruddaðu okkum av vøllinum. Teir vunnu sannførandi 3-0, og okkara menn fingu ongantíð fótin fyri seg. Í dag er týdningarmikið, at tað ikki gongur sum tann dagin í Leirvík.

Vit hava – eins og LÍF – brúk fyri øllum stigum, men í dag kunnu teir tó klára seg við einum javnleiki. Tó fara teir helst eftir øllum stigunum, uttan at leika álopskent. Heldur fara teir at dúva uppá mótálop, sum kann sekta verjuna hjá okkum. Vit sóu eitt nú í dystinum ímóti HB her, at vit ofta eru ov lættir at yvirspæla tá mótstøðuliðini spæla upp á skjót mótálop. –Heldur ikki megna vit serliga væl at mynda ein dyst. Vit kunnu spæla væl, men hava tá ofta trupult at umseta málmøguleikarnar til mál.

Hetta merkir tó ikki, at vit skulu leggja okkara spælistíl eftir tí hjá LÍF. Nei, vit skulu leggja trýst á allastaðni á vøllinum, og ongantíð geva teimum úr Leirvík frið at spæla bóltin sínamillum. Okkara leikarar eru somikið væl fyri kropsliga, at teir ongan trupulleika hava at leggja trýst á eitt lið ein heilan dyst.

Hyggja vit at stigatalvuni, sæst, at talan er um toppdyst í deildini, sjálvt um flestu liðini - undantikið oddaliðið FS Vágar – liggja ógvuliga jøvn á stigatalvuni. Tí er dysturin í dag serliga avgerðandi fyri gongdina í landskappingini. Ein sigur í dag hevur við sær, at tú kanst fáa nakað av ræsarúmi.

Hvussu liðið hjá okkum verður sett saman í dag, vita vit ikki, men seinasta mánaðin hevur ljóðað, at ein danskur verjuleikari er á veg til ÍF. Um tað er tað, sum skal til, er ilt at siga, men tað er eingin loyna, at vit hava havt ávísar trupulleikar í verjupartinum fleiri dystir. Vónandi kann nýggi verjuleikarin (um hann kemur, sjálvsagt) fáa skil uppá hetta. Tí verjuparturin er eins – um ikki meir - týðandi enn álopsparturin. Og her talan hagtølini fyri seg. -Vit eru tað liði, sum hevur latið næstflest mál fara ígjøgnum. Heili 18 ferðir hevur okkara málverji verið í málinum eftir bóltinum, og bert VB hevur latið fleiri mál inn. Hetta er ikki hagtøl tú kanst vera errin av. Hinvegin, hava vit skotið heili 21 mál, sum er 12 færri enn FS Vágar, sum hevur skotið flest. Tí halda vit, at vit kunnu loyva okkum at spyrja, hvar tað serliga er brúk fyri styrki!

Í øllum førum kunnu vit bert staðfesta áðrenn dystin í dag, at ein sigur ímóti LÍF er týdningarmikil.




**Tannlæknastovan**

við

***Steintór Larsen,***
***tannlækna***

og

***Brynhild Mariu***
***Lamhauge,***
***tannrøktara***

Torkilskrókur 8
530 Fuglafjørður
tel. 444 358







GRANNSKOÐARASTOVAN Sp/f
480 Skála tel. 44 16 66 fax 44 18 71




**NISSAN ALMERA** · GÓÐAN TÚR

Tann nýggi Almera. Bygdur og sniðgivin av einari orsøk – fyri at hjálpa tær at lúka øktu krøvini frá nútímans tilveruni. Og tað er ein bilur, sum tú kanst líta á. Hann megnar allar støður frálíka væl.

℅ Meinhardt Arge

*(framhald frá bls. 26)*
brúkast øðrvísi.

- Umsitingin av feløgunum er ov tilvildarlig. Eitt fótbóltsfelag átti at verði rikið sum ein fyritøka, og tað vil siga við løntari arbeiðsmegi. Tá hevði borið til at sett hægri krøv til førleikan hjá teimum sum standa fyri rakstrinum av feløgunum, og tá hevði eisini borið til at skipað arbeiði betri soleiðis at meira fekst burtur úr, sigur Pauli. Hann leggur tó dent á, at hann er fullgreiður um, at tað er lættari sagt enn gjørt, tí í fyrsta umfari hevði tað helst kravt, at feløgini skuldu fingið fatur á enn meira peningi frá sponsorum og øðrum tiltøkum.

-Men tað er ein spurningur um feløgini ikki høvdu rokkið hesum málið, um so var, at tey vóru rikin betri. Eg eri næstan fullvísur í, at sponsorarnir høvdu vilja latið størri upphæddir um teir vistu, at peningurin varð brúktur skilabetri og at vónir vóru um, at meira fekst fyri hann, leggur Pauli afturat.

Úrslitið av øllum stríðnum, sum fótbóltsfeløgini í dag hava er, at málini, sum feløgini seta sær eru alt ov tilvildarlig. Nógvir leikarar skifta feløg ár um ár, og Pauli heldur at tað sæst aftur á vøllinum, tí spæligleðin er ikki tann sama, sum hon var fyrr.

- Spælararnir flyta seg eftir pengunum, men krøvini sum vera sett teimum eru ikki samsvar-andi upphædd-unum. Allarflestu spæl-ararnir sum hava sáttmála, hava annað arbeiði umframt, og tí er ikki neyðugt hjá teimum at liva av pengunum teir fáa fyri fótbóltin. Men upphæddirnar eru kortini so mikið stórar, at feløgini ikki hava pening til so nógv annað enn spælararnar, og á tann hátt kunnu vit siga, at teir ungu leikararnir, sum jú eru framtíðin, vera sviknir. Og eftir míni meting má hetta broytast, um vit aftur skulu síggja menning í føroyskum fótbólti, sigur Pauli Jarnskor.

**Summarsteðgurin burtur**

Eitt annað, sum Pauli heldur er neyðugt at broyta, er summarsteðgurin. Eftir hansara tykki ger tað bara føroysku kappingini fortreð, at hava ein steðg mitt á sumri, tí alt tað sum er bygt upp síðani kappingin byrjaði, skal byggjast uppaftur av nýggjum.

- Eg dugi ikki at síggja eina veruliga orsøk til, at kappingin skal leggjast still um summarið. Leikarar, sum hava valt at spæla fótbólt, gera tað fyri at mennast, og í fleiri ungum leikarum hava vit evnir, sum kunnu gerast yrkisleikarar. Skulu teir tað nyttar einki, at vit kappingin liggur still ein mánað um summarið og seks mánaðir um veturin, sigur Pauli.

Í veruleikanum er tað so, at flestu liðini byrja at venja í januar mánaði, men sum øllum kunnugt loyvir veðrið ikki, at vant verður á vølli við bólti. Hetta er sjáldan gjørligt fyrr enn seinast í marts ella fyrst í apríl mánaði, og tá hevur steypakappingin koyrt í ein mánað. Og bara tríggjar mánaðir eftir at landskappingin er komin í gongd, og tá leikararnir eru komnir í form, er summarsteðgur, og so skal alt byrja av nýggjum.

- Vit áttu ístaðin at leikt út í eitt, tí so hevði verið samanhangur í kappingini alla tíðina, og so høvdu leikararnir verði undir størri trýsti alla tíðina. Og harafturat haldi eg eisini, at vit áttu at farið undir eina skipaða vetrarkapping fyri at hildið spæl-arunum til, sigur Pauli Jarnskor.

Og hann góðtekur als ikki undanførslurnar um, at vetrarítróttargreinarnar líða undir hesum.

- Vit eru uppi í altjóða fótbólti og vit hava heilt einfalt ikki ráð til at liggja

*(framhald á bls. 31)*



## TÚ

**Navn:** Høgni Madsen
**Føðingardagur:** 04.02.1985
**Føðistað:** Fuglafjørður
**Starv:** Skúlanæmingur
**Pláss á vøllinum:** Miðvallaleikari/ áleypari
**Hædd og vekt:** 179 cm. og 73 kg.
**Yvirtrúgv:** Velji ikki 13 sum royndarspurning
**3 orð sum lýsa teg:** Róligur, ikki so skjótur og gott yvirblikk
**Torførast mótstøðumaður:** Havi ikki møtt honum
**Frítíðarítriv:** Saman við vinum og fótbóltur
**Vónir fyri 2002:** At menna meg enn meir sum fótbóltsspælara og at ÍF flytir upp í 1. deild



**Hvat slag av venjing dámar tær ikki:** At renna
**11 teir bestu fótbóltsleikararnir í heiminum:** Fabian Barthez - Cafu, Lucio, Lauren Blanc, Mikael Silvestre- David Beckham, Roy Keane, Zinedine Zidane, Ronaldinho - Totti, Ruud Van Nistelroij

## TÍN ÍTRÓTT

**Fyrsti dystur á 1. liðið:** Tað var á mínum 17 ára føðingardegi , 4. Februar í ár
**Nær spældi tú fyrstu ferð fyri ÍF:** Tá eg var ein 4-5 ára gamal
**Aðrar ítróttargreinar:** Flogbólt og badminton um veturin
**Minnigarríkasti dystur:** Tað má vera unglingafinalan á Tórsvølli móti KÍ í fjør. Vóru rættiliga óhepnir at tapa 2-7
**Størstu fótbólsliga ávirkan:** Gera tunnell ímóti Paula Jarnskor
**Besti fótbóltsleikari:** Francesco Totti
**Um ikki fótbólt, hvørja ítróttargrein hevði tú so valt:** Triathlon ljóðar nokkso "skeg"
**Hvat slag av venjing dámar tær best:** Tað er at spæla millum 2 mál, helst tá teir ungu spæla ímóti teimum eldru (vit ungu plaga annars at vinna)

## TÍNIR FAVORITTAR

**Matur og drekka:** Kjøtfrikadellur og mjólk afturvið
**Slag av tónleiki:** Lurti eftir næstan øllum
**Sjónvarpssending:** Spin City
**At slappa av:** At sova
**Troyggja nr.:** Nr. 18
**Besti fótbóltsleikari yvirhøvur:** Michael Laudrup
**Sjónvarp/filmstjørna:** Hasin maðurin í tí føroyska HM-studiunum, Tórur Mikkelsen, er fínur
**Besta bók/blað:** Anders And

# Fuglafjørður

býurin, har mentan og vinnulív taka lógvatak

býurin, har náttúra og fólk eru blíð

býurin, har fortíð og nútíð hittast

býurin, har øldirnar tala



**Stutt sagt:**

býurin, har nógv hendir

býurin, ið er eina vitjan verdur

**Fuglafjarðar kommuna**

tel. 44 40 06 fax 44 46 57 fko@fuglakomm.fo






Besta
**pizza'in**
í býnum

**PrimaVera**
Kambsdalur
tel. 444 446



**Soleiðis slættar tú fíggjarligar sjógvar**

Við Heildarkontu fært tú eitt gott yvirlit yvir tín búskap. Tú rindar eitt javnt, fast gjald um mánaðin. Sparikassin syrgir fyri, at tínar rokningar verða goldnar til tíðina. So einfalt er tað.

**FØROYA SPARIKASSI**
www.sparikassin.fo

(framhald frá bls. 6)

ein styrkur, og tað verður bara uppaftur verri, tá hugsað verður um, at teir taka plássini frá ungum føroyskum leikarum. Samstundis er tað ein stórur spurningur, um føroysku leikararnir, sum fáa teir nógvu pengarnar, eru tað verdir. Eg haldi ikki, tí teir vísa tað ikki á vøllinum, sigur Pauli og vísir á, at næstan ongir føroyskir leikarar eru eftir uttanlands nú. Og rætt hevur hann í tí. Í roynd og veru er tað bara Todi, sum er við í útlendskum leiki, og hann er ikki aktuellur á landsliðnum. Jens Martin Knudsen, Julian Johnsson, Óli Johannesen, Jens Erik Rasmussen, Uni Arge, Jens Kristian Hansen, John Petersen, Allan Mørkøre og Sámal Joensen eru allir komnir heimaftur uttan at eins nógvir eru farnir út.

- Vit hava verið í altjóða fótbólti síðani 1990 og áttu, um alt var rætt, at havt fleiri spælarar uttanlands, men nú eru bara Todi, Jákup Mikkelsen, sum ikki spælir serliga nógv, og Ingi Højsted, sum er lærlingur í Arsenal, eftir, og tað eigur at geva teimum, sum vara av fótbóltinum nakað at hugsa um, sigur Pauli.

Tí heldur hann, at føroysku feløgini áttu at sett seg niður fyri at finna út av, um tað ikki hevði verið skilabetri at brúkt størri upphæddir upp á yngru leikararnar í feløgunum heldur enn at oyðsla alt burtur upp á løtuvinning í teimum eldru deildunum.

- Vit vita, at vit gera okkurt rætt, tí tá okkara ungdómar kappast við útlendskar ungdómar, eru teir á jøvnum føti. Men tá teir eldast, gerst munurin alsamt størri, og tað má vera tekin um, at alt ikki er sum tað skal vera. Tí haldi eg, at vit áttu at skipa ungdómsarbeiði betur soleiðis at menningin av leikarunum byrjaði heilt frá botninum av. Og eg eri vísur í, at vit síggja ikki veruligt úrslit fyrr enn vit broyta hugburð á hesum øki, sigur Pauli.

**Fyrisitingin eisini broytast**

Slíkar broytingar sum hesar, eru ikki bara soleiðis at seta í verk. Feløgini byggja jú í allarflestu førum á ókeypis arbeiðsorku, og tí ber illa til at seta stór krøv. Í allarflestu førum er tað soleiðis, at feløgini seta ein løntan venjar at taka sær av besta liðnum, meðan ungdómsdeildirnar framvegis verða riknar við lítlari ella ongari samsýning.

Hetta, heldur Pauli, átti at verið broytt soleiðis, at feløgini vóru umskipað soleiðis, at nevnd og leiðsla meira samsvarar við, at talan í veruleikanum er um eina fyritøku, og tað merkir, at peningurin, sum í dag kemur inn í feløgini skal

*(framhald á bls. 28)*


Álvaskot
Fysioterapiviðgerðarstova
v/Álvi Hansen
530 Fuglafjørður
Tel. 44 51 44






P/F Poul Michelsen
Hoyvíksvegur 74, P.O.Box 200, FO-110 Tórshavn
Tel +298 31 46 50, Fax +298 31 81 63, e-mail: pm@pm.fo

Altíð nýbakað breyð
Sunnumorgnar fæst breyð á hesum støðum:
Statoil í Leirvík
Hjá Halluri í Gøtu
Hjá Rannvá í Søldarfirði
Statoil í Saltangará
Kiosk Vár í Saltangará
Statoil á Strondum
Handilin er opin soleiðis:
Mán - leyg: 07.00-12.00
Sun: 08.30 - 10.30

BREYÐMOLIN
530 Fuglafjørður - tel./fax 444 388



Salong Yndi
530 Fuglafjørður
Tel. 444 490



Klæðir til ung og eldri
ANNA
530 Fuglafjørður
tel. 444 899

Fuglafjarðar Keypsamtøka

Tel. 444 095 - 444 495
Fax 444 895

REKLAMUPRENT Sp/f
Tel. +298 44 20 42 Fax. +298 44 21 42

HUGSKOT
DESIGN
LAYOUT

SKELTIR
BILREKLAMUR
TEXTILPRENT
VEGSKELTIR
PICTOGRAMMIR
FOLIESTAVIR

HEILDARLOYSNIR


ONLY
VERO MODA
Vælkomin í
KATO
Fuglafjørður

JÓNA DANSAR Í
LONDON
...men



hon hevur framvegis
eitt gott samstarv
við Føroya Banka!

kontoIN
okkara ungdómskonto

petur & petur • 320870

Danny Transport

Tel. 31 91 92

Flutningur um
allan heim!

Heimavirkis søla og framsýning

Piddasa handil

FUGLAFJARÐAR HEIMAVIRKISFELAG

Gallarí Ribarhús

Opið er:
mán.-frí: 15.00-17.30
leyg.: 11.00-13.00

Tel. 444 427

# Leiga buss??



Vit hava ein buss til 16 persónar.
Harav serútgjørdur til 8 ferðandi í rullustóli.
Vit eru altíð til reiðar at samráða eina nøktandi loysn fyri báðar partar.

**Andreas Poulsen**
Syðrugøta tel. 22 52 20 ella 44 17 20

*Reiðari innan frakt- & sandbátar*
*Krana- og lastvognskoyring*
*Sandsøla*

**SANDGREVSTUR**

Stovnað 1949

530 Fuglafjørður
tel. 444 121
fax 444 921

Landsins **størsta** og **besta** úrval av ítróttarheiðursgávum

- Steyp
- Heiðursmerki
- Heiðursbrøv
- Toy við búmerki
- Streamers
- Klistrimerki
- Seruppgávur við gravering

Vit seta **títt** búmerki á klistrimerki, streamers, toy, minnislutir og mangt annað

FA. **EILIF ARGE**
KLAKSVÍKSVEGUR • 700 KLAKSVÍK
TLF. 45 61 64 • FAX 45 75 76

# Lastvognskoyring




**Øll lastvognskoyring verður gjørd**

**Kári Zachariassen**
530 Fuglafjørður
tel. 444 245 ella 217 245



# DAEWOO bilar við smáum prísum...




Matiz
Tocuma
Nubira
Leganza

**Lanos** 138.000,-

DAEWOO

## Fiskamjøl



Fiskamjøl er ein proteinkelda, og verður millum annað brúkt til fóðurblandingar til alifisk, hœsnarungar, svín og neyt.

## Fiskalýsi



Lýsið verður brúkt til alifóður, margarin og aðra tøkniliga nýtslu.

## Fiskafóður



Fóðrið fer til alifisk. Fiskafóður er ein tann orkuríkasti úrdráttur, ið yvirhøvur verður framleiddur.

## Uppisjóvarfiskur



Uppisjóvarfiskur er bæði matfiskur og fóðurfiskur.

HAVSBRÚN

**HAVSBRÚN**

Havsbrún Ltd. · 530 Fuglafjørður
tel. 444 100 · fax 444 160
havsbrun@havsbrun.fo
www.havsbrun.fo





# Frá dreymi til veruleika

Hava tit brúk fyri eini tekning, vilja tit smíðja sjálvi ella skulu tey vera lyklaklár.

Eg bjóði meg til:

- at tekna
- at byggja
- at biðja um tilboð uppá sanitet, el hita o.s.fr.

Ring og eg gevi eitt óbindandi tilboð.

**JLJ - BYGGING**
v. Jormund L. Juul (verkfrøðingur & húsasmiður)

☎ 21 47 87 & 44 47 87
teldupostur: jljuul@post.olivant.fo

# ORKUSPARANDI STOYPIJARNSKETIL

Logica ketilin er ein av teim førandi stoypijarnsketlinum á marknaðinum. Brúk verður tikið av ný tøkni innan orkusparing, ið tryggjar kundanum tann bíligasta rakstrin.




**Ketilin er lættur at reinsa, og er ljóð isoleraður**





Tekningin her vísir hvussu gongdin hjá roykinum er gjøgnum ketilin. Dentur verður lagur á at ongin hiti fer til spillis.

**Leysar roykforingar eru við til at økja um bíligan rakstur**



**VVS HORNIÐ spf**

**Landavegur 2 . Tórshavn**
**Tel 318023 / Fax 310963**
**vvshornl@post.olivant.fo**





**JBS-TRÆ Snikkarakjallarin**
Fløtugerði 34
530 Fuglafjørður
Tel. 444 784
Fartel. 21 57 84

**Stórt úrval av steypum og heiðursmerkjum til allan ítrótt**




SP/F LEIVUR ELLINGSGAARD
OPTIK - URSMIÐJUR
Tel. 45 52 03 - FO-700 Klaksvík

***Blómuhandilin***
# *Orkis*
***625 Glyvrar***

*Blómutyssi, plantur, samanplanting, kurv, brúðarblómutyssi, borðprýði, kransar o.a.*

***Stórt úrval av gávulutum***

***tel 44 82 89***
***fax 44 89 89***




E&B VIRKIÐ

Element- og Betongvøruvirkið við Gjógv

tel 423173/445173
fax 444773

e-bvirki@post.olivant.fo



ALILAKS

**Føroya Shell**

| | |
|---|---|
| **Tórshavn** | **tel 34 74 00** |
| **Norðoyar** | **tel 45 77 11** |
| **Eysturoy** | **tel 44 87 11** |
| **Vágoy** | **tel 33 27 11** |
| **Sandoy** | **tel 36 17 11** |
| **Suðuroy** | **tel 37 27 11** |

*(framhald frá bls. 4)*
leikanum hava verði á húsagangi, men kortini halda vit somu kós. Og tað er óhugnaligt, tí vit menna ikki føroyskan fótbólt á henda hátt, sigur Pauli.

Og tá nerta vit við ein annan part av føroyskum fótbólti, tann, sum vit í veruleikanum fáa gjørt minst við. Nevndirnar. Eru tær í heila tikið nóg búnar til at reka feløgini, ella vita tey, sum manna tær, yvirhøvur hvat tað snýr seg um.

Sjálvandi ber illa til at skera alt yvir ein kamb, men einki er at ivast í, at leiðslan er ein stórur trupulleiki í fleiri feløgum. Men spurningurin er líka nógv, um vit kunnu krevja tað av teimum, tí tað arbeiðið tey leggja í feløgini er ókeypis, tí talan er um frítíðarítriv. Ein annar spurningur er so, um tað er rætt, tí í roynd og veru kunnu feløgini í dag samanberast við virkir, men leiðslurnar eru framvegis sum tær vóru tá alt byrjaði.

**Krøvini ov smá**

Niðurstøðan hjá Paula eftir at hava fylgt við fótbólti seinastu nógvu árini er altso, at føroyskur fótbóltur í besta føri stendur í stað. Sum sagt hellur hann meira til, at tað gongur øvugtan veg við menningini, og tað byggir hann eitt nú á, at tað hendir øgiliga lítið í dystunum. Nógvir dystir ganga í tómgongd, og tað eru øgiliga fáir føroyskir leikarar, sum seta síni fingramerkir á kappingina.

- Tað eru bara nakrir heilt fáir leikarar, sum veruliga kunnu sigast at vera í toppformi, og tað eru bara nakrir heilt fáir, sum skara framúr. Á miðvøllinum er tað kanska bara Fróða Benjaminssen sum tað glógvar í, og tað er ov galið haldi eg, tí tað eru nógvir evnaríkir fótbóltsspælarar í landinum, sigur Pauli.

Spurdur, hvør orsøkin til vantandi menningina er, heldur Pauli, at feløgini áttu at sett spælarunum størri krøv. Spælararnir skulu ikki sleppa við at gera minst møguligt.

- Eg haldi heilt einfalt at spælararnir sleppa ov bíliga. Í fleiri av teimum dystum eg havi hugt eftir, sleppa spælarar at smárenna runt á vøllinum ístaðin fyri at arbeiða, og tað er ikki rætta myndin at geva teimum ungu. Tað mennir heldur ikki føroyskan fótbólt, tí tá teir ikki tíma at stríðast í heimligu kappingini, hjálpir lítið at stríðast tá teir eru í altjóða kapping, tí tá er munurin so øgiligur, sigur Pauli Jarnskor og vísir á dystin hjá B68 móti St. Gallen sum dømi.

St. Gallen er ikki eitt av kendastu liðunum, men móti einum av allarfremstu liðunum í okkara landskapping, vunnu teir 11-1 í tveimum dystum, og tað sigur eitt sindur um munin.

- Hugsa tær so, hvat hendir tá gøtumenn fara til Hajduk Split og B36 skal spæla móti georgiska meistara-liðnum. Eg eri stórliga bangin fyri, at okkara menn fáa ein álvarsligan lúsing, sigur Pauli. Og orsøkin er, at heimliga kappingin er ikki nóg góð.

**Byrja frá botninum av**

Tá vit spyrja Paula um, hvør loysnin á trupulleikunum hjá føroyskum fótbólti, eftir hansara tykki er, sigur hann, at vit mugu venda byttuni á høvdið. Peningurin, sum er komin inn í føroyskan fótbólt verður brúktur á skeivum stað, tí hóast tað eru teir ungu leikararnir, sum eru framtíðin hjá føroyskum fótbólti, eru tað ikki teir, peningurin verður brúktur uppá.

- Vit taka útlendingar inn á føroysku liðini, men krøvini vit seta teimum eru heilt einfalt ikki nóg hørð. Verri enn so allir eru so nógv betri, at teir eru ein styrkur, og tað verður bara uppaftur verri, tá hugsað verður um, at teir

*(framhald á bls. 26)*





# HAGTØL & FAKTA

**STØÐAN 2. DEILD MENN - 21. juli**

Ikki dagført!

| Lið | Dyst | V | J | T | Mál | Stig | Heima | Úti |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1. FS Vágar | 9 | 6 | 2 | 1 | 33-8 | 20 | 4-0-0 | [illegible] |
| 2. Sumba | 9 | 4 | 3 | 2 | 14-12 | 15 | 2-2-1 | [illegible] |
| 3. LÍF | 9 | 4 | 2 | 3 | 18-15 | [illegible] | [illegible] | 2-1-2 |
| 4. ÍF | 9 | 4 | 1 | 4 | [illegible] | [illegible] | 3-0-2 | 2-1-2 |
| 5. KÍ | 9 | 3 | [illegible] | [illegible] | 14-14 | 13 | 2-2-1 | 2-1-1 |
| 6. B71 | 9 | 3 | [illegible] | 3 | 12-8 | 12 | 2-2-0 | 3-1-1 |
| 7. HB | [illegible] | 3 | 2 | 4 | 13-13 | 11 | 1-1-2 | 1-2-2 |
| 8. B36 | 9 | 2 | 4 | 3 | 10-16 | 10 | 1-3-1 | 2-1-1 |
| 9. NSÍ | 9 | 3 | 1 | 5 | 8-14 | 10 | 3-0-1 | 0-1-4 |
| 10. VB | 9 | 2 | 0 | 7 | 5-30 | 6 | 2-0-3 | 0-0-4 |

**Kort - landskapping**

Ikki dagført!

| Leikari | S | R |
|---|---|---|
| Eyðun Ryggshamar | 1 | 1 |
| Tórstein Joensen | 2 | |
| Eyðolvur R. –Petersen | 2 | |
| Heini Heinason | 1 | |
| John Thomsen | 1 | |

**Aðrir dystir í dag 2. deild**

HB - B71
Sumba - B36
KÍ - NSÍ
VB – FS Vágar

**Málskjúttar**

Ikki dagført!

| | |
|---|---|
| Clayton Soares, FSV | 9 |
| *Heini Heinason, ÍF* | 7 |
| Jónsvein Thomsen, B71 | 6 |
| Olgar Danielsen, KÍ | 6 |
| Kristian í Vági, LÍF | 6 |
| Eirikur Joensen, Sumba | 6 |
| Petur Sjúrðaberg, LÍF | 4 |
| Carl Høgnesen, B36 | 3 |
| Bjarni [illegible], FS Vágar | 3 |
| *Eyðolvur R. Peters., ÍF* | 3 |
| *Høgni á Lakjuni, ÍF* | 3 |

**Málskjúttar ÍF Lands- og steypakappingin**

Ikki dagført!

| Leikari | S |
|---|---|
| Heini Heinason | [illegible] |
| Høgni á Lakjuni | 3 |
| Høgni Zachariasen | 3 |
| Rúni Petersen | 3 |
| Viggo Johannesen | 2 |
| Eyðolv R. Petersen | 2 |
| Mortan Thomsen | 1 |

**Dystir í 1. deild 11.08 - 12. umfar**

EB/Streymur - B68
TB - KÍ
HB - B36
Skála - GÍ
NSÍ - VB

**Vert at vita**

Komandi leygardag 17. august skulu vit leika ímóti B36 í Gundadali. Næsti heimadysturin verður leiygardagin 24. August, tá vit leika ímóti Sumba í Fuglafirði.

3. deild spælir í morgin ímóti AB heima. Næsta sunnudag, 18. august spæla teir ímóti samansetta liðnum úr Vágunum har vesturi.

Um tú atkvøður í dag um, hvør er dagsins leikari, so er tú við í lutakastinum um at vinna eitt lambskrov frá Haraldsen. Atkvøðuseðlar eru á síðu 26, ella tú kanst fáa teir í ovaru hæddini Ítróttarhúsinum undir og beint eftir dystin.

**Dystir í 3. deild 11.08 - 11. umfar**

ÍF - AB
B68 - TB
B71 - HB
B36 - Royn
GÍ - FS Vágar

**Tilfar til umvælingar, ábøtur ella annað....**
**....spyr fyrst hjá okkum!!**

## Fuglafjarðar Timburhandil
tel. 444 126



Gardintoy
Gardinstengur
Persiennur
Rullugardinur
Liftgardinur
Tógv & stokkar
Uppskriftir

Vit seyma gardinur
Støkk inn á gólvið til eitt
gardin ella tógv prát

**Toy & Tógv** • 530 Fuglafjørður • tel. 444 494



KJ

**Altíð til tygara tænastu**
tá ið tað snýr seg um:

**HYDRAULIK**
**RÁÐGEVING**
**VERKÆTLANIR**
**ÍSETANIR**
**UMVÆLINGAR**
**MASKINUMVÆLINGAR**
**SVEISING, DREYING, BORING OG FRESING**



**Sølu-og tænastuumboð fyri:**

- Rapp Hydema (trol- og hjálpispøl)
- Rapp Hydema Syd (garna- og línuspøl, kraftblokkar, Capstanar)
- Rapp Bomek (skipsútgerð)
- Palfinger (marine kranar)
- Pullmaster (lossi- og kranaspøl)
- Triplex, Hydralift (eykalutir)
- DensIon hydraulic (pumpur, ventilar v.m.)
- Danfoss Hydraulik (motorar, pumpur, ventilar,v.m.)
- Vickers (pumpur, ventilar v.m.)
- Rexroth (pumpur, ventilar v.m.)
- Parker Hydraulics (filtur, pumpur, ventilar, fittings v.m.)
- Casappa (tannhjólspumpur 4-40 ltr.)
- Hagglund (spælimotorar)
- Dinamic Oil (kranaspøl)
- Finn Filter (hydraulik-, brenniolju og smyrjioljufiltur)
- FBO (hydraulikfiltur)
- Trelleborg (ídnaðarslangur)
- ABC (dieselmotorar)
- Iveco (dieselmotorar)

**Á goymslu:**

Hydr, slangur og fittings, hydr, rør og fittings, (manøvri- og kúluventilar, kúluleigir, hydr. filtur, smyrji- og brennioljufiltur), koblingar og koblingshúsar, magnetkoblingar, tetningsringar, stempul, stempulstengur o.m.a.

## KJ-HYDRAULIK
**P/F KÁRI JOHANNESEN, maskinverkstaður**
Postbox 110 FO-530 Kambsdalur (Fuglafjørður) Faroe Islands
Tel. +298 444170 Fax +298 444265
e-mail: kj@kj-hydraulik.com www.kj-hydraulik.com

# FØROYSKUR FÓTBÓLTUR Í EINUM ALDUDALI

**Týsdagin 9. juli stóð forvitnislig grein í Dimmalætting, har okkara venjari, Pauli, segði sína hugsan um føroyskan fótbólt. Greinina hevur Sveinur Trónsarson skriva, og við loyvi frá honum prentað vit greinina - í fullum líki - í leikskránni hesaferð.**

Pauli Jarnskor, gamal fyrstudeildar leikari hjá GÍ-leikari og núverandi venjari hjá ÍF, leggur ikki fingarnar tá hann metir um tað, hann hevur sæð í føroysku landskapping-ini í ár. Tað hevur lítið upp á seg, og hann heldur eina orsøk vera, at spælararnir offra seg ov lítið. Teir flestu tíma ikki at gera meira enn allarhægst neyð-ugt. – Og við tí hugburðinum koma vit onga leið frameftir, sigur hann.

Fótbóltslandskappingin er farin í summarfrí og næstu fýra vikurnar frætta vit einki frá landskappingini. Fyrsti veruligi dysturin sum verður á skránni er steypafinalan og hon liggur á Ólavssøku. Ístaðin fyri at kasta pennin frá okkum, hava vit valt at finna onkran, sum hevur okkurt upp á hjarta um føroyskan fótbólt, og fyrsta offrið funnu vit í Gøtu. Hann eitur Pauli Jarnskor og sum gamal fyrstudeildar leikari hevur hann okkurt upp á hjarta.

Pauli leikti í fleiri ár við besta liðnum hjá GÍ, har hann vann fleiri FM-heitir. Eftir at hann setti skógvarnar frá sær fyri well, hevur hann átikið sær at venja besta liðið hjá fuglfirðingum, og tí er tað hann sum stendur á odda fyri royndunum hjá fuglfirðingum at røkka fyrstu deild.

Nú er tað so, at onnur deild spælir leygardag, og tí hevur Pauli sæð rættiliga nógvar landskappingardystir í bestu deildini í ár, og hann ógvast ikki við av tí hann sær. Heldur tvørturímóti, tí í royndog veru glógvar tað bara í heilt fáum spælarum, heldur hann. Og eisini tað hevur hann sína hugsan um.

**Nógvir stórir trupulleikar**

Stutt sagt heldur Pauli Jarnskor, at føroyskur fótbóltur hevur mist tey seinnu árini. Ístaðin fyri at landskappingin hevur ment seg, heldur hann, at kappingin er versnað. Intensiteturin manglar í teimum allarflestu dystunum, tí menn sýnast ikki áhugaðir at stríðast. Og tað er løgið tá hugsað verður um, at pengar eru komnir inn í føroyskan fótbólt. Um vit vilja viðganga tað ella ikki.

Hetta er eisini ein partur av prátinum við Paula. Spurningurin um pengarnar er sjálvandi áhugaverdur, tí tað er í veruleikanum ein brennandi spurningur, um pengarnir ikki vera brúktir skeivt tá til stykkis kemur. Heldur enn at brúka stórar upphæddir til leikarar, sum kortini ikki eru betri enn næstbest, áttu feløgini heldur at brúkt peningin upp á yngru deildirnar, sum í veruleikanum eru við sviðusoð í nógvar mátar. - Vit eru í ferð við at fara eftir somu skeivu leið, sum danskur fótbóltur fór tá pengarnir komu upp í leikin. Tá varð satsað stórt – alt ov stórt – og tí fóru fleiri feløg so syngjandi á húsagang. Vit vita, at fleiri føroysk feløg hava ligið so tungt í sjónum, at tey í veru-

*(framhald á bls. 26)*





# SPURNAKAPPINGIN

HM-ENDASPÆLIÐ 2002

## Hvussu nógv og væl minnist tú úr HM-enda-spælinum, sum júst hevur verið?

Hesaferð venda vit eyguni móti HM-endaspælinum, sum júst hevur verið í Japan og Suður Korea. Teir fimtan spurningarnir til høgru nerta við nakað av tí, sum HM-endaspælið hevði at bjóða. - Leikarar, mál, hendingar og annað, men langt og frá alt. Tú kanst kanna eftir, hvussu væl tú fylgdi við Í kappingini, og hvussu nógv tú veitst um hetta evni, við at svara spurningunum. Stigini verða givin soleiðis, at: Svarar tú 1. spurningi rætt, fær tú eitt stig, næsti spurningur gevur tvey stig o.s.fr.

**0-20 stig:** Eingin vón. Antin ert tú ikki áhugaður í fótbólti, ella veitst tú bara einki um evni. Nýt heldur tíðina upp á okkurt annað!

**21-45 stig:** Krevur bata. Tú veits ikki nógv um fótbólt, men tó...

**46-70 stig:** Miðal. Við at fylgja eitt sindur betur við, gongst tær kanska betur næstu ferð!

**71-100 stig:** Væl yvir miðal. Tú eigur at umhugsa tína støðu, sum ítróttarspurnakappingar-evni!

**101-120 stig:** Sera gott. Okkum væntar fólk at gera spurningar!

Røttu svarini eru á bls. 31.

Góða eydnu!

### 15 spurningar um HM-endaspælið 2002

1. Hvar var finalan leikt, og hvør dømdi hana?
2. Hvat lið vann størsta sigurin í einum dysti í kappingini. Hvat endaði dystuin, og hvat var mótstøðuliðið?
3. Hvør varð valdu til besta leikaran í kappingini?
4. Størsta stjørnan á Suðurkoreanska liðnum, leikar dagliga í Italia. Eftir sigurin móti Italia segði italska felagið sáttmálan upp. Hvussu eitur hann, og hvat italskt felag leikar hann við?
5. Hvat lið skeyt flest mál í kappingini?
6. Hvussu eitur franski landsliðvenjarin, sum eftir vánaligu úrslitini í HM-endakappingini varð sagdur í starvi?
7. Hvør skeyt skjótasta málið í kappingini og málið varð samstundis tað skjótast nakrantíð í einum HM-endaspælið. Og í hvørjum dysti varð málið skotið?
8. Bert eitt land úr Afrika kom víðari úr bólkaspælinum. Hvat land, og hvørjum taptu teir ímóti í fjórðingsfinaluni?
9. Hvør var venjari hjá Suðurkorea undir HM-endaspælinum, og úr hvørjum landi er hann úr?
10. Hvussu eitur venjarin hjá brasilska landsliðnum?
11. Hvussu eitur leikarin, sum fekk serliga langt leikbann fyri at hava sligið argentinska dómarin Angel Sanchez, og hvat land umboðar hann?
12. Trý lið fingu einki mál í allari HM-kappingini, hvørji vóru tey?
13. Hvør skeyt fyrsta málið í kappingini?
14. Tríggir norðulendingar vóru dómarar í HM-endaspæliðnum. Hvørjir vóru hesir?
15. Ein leikari fekk tvey reyð kort (1 reytt og 2 gul) í kappingini, hvør var hann?

# Heildarveiting av tí heimskenda merkinum HP (Hewlett Packard)





HEWLETT® PACKARD

Expanding Possibilities

Alt innan heimateldur, virkisteldur, servarar, prentarar, net og mangt annað....

Avtala um viðlíkahald av teldum/teldukervi kann gerast út frá tygara tørvi.

Arbeitt verður fyri virkir, skúlar og stovnar.

Fast internetsamband til privat/virkir og stovnar, fyri einans 515,- u/MVG pr. mðr.

## Atlantic Online Sp/f

Í Støð 8
FO-530 Fuglafjørður
Tlf: +298 444487
e-post: atlantic@online.fo








30°

Eisini hava vit skógvar til børn og vaksin



## TOYSTOVAN

530 FUGLAFJØRÐUR • TEL. 444 637

guys essential fits



®501® L'Authentique Original Jeans Levi's® RED TAB®



Standard Bootcut Coupe Boot Cut ®507 Levi's® RED TAB®



Standard Flare ®516 Levi's® RED TAB®

girls essential fits



Slim Bootcut ®525 Levi's® RED TAB®



Super Low Flare ®544 Levi's® RED TAB®

Levi's

Levi's® buksur

1 par 699,-

2 pør 1.200,-

VØRÐSLAN WEARHOUSE

Í Støð • 530 Fuglafjørður • Tel. 444 747

Ítróttarfelag Fuglafjarðar
Postboks 94
530 Fuglafjørður
Tel. 444 636
Fax 444 636

# ÍF - HB

**11. umfar í landskappingini hjá 2. deild monnum**
**10. august 2002**

## Leikskrá 6

**Útgevari:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Blaðnevnd:**
*Signar á Brúnni*
*Birgar Larsen*
*Rógvi Róin*

**Myndir:**
*Álvur Haraldsen, Sosialurin*
*Rógvi Róin*

**Kápumynd:**
*Jón Brekku, B36, hevur sparkað bóltin burtur áðrenn Heini sleppur framat. Aftanfyri sæst John Thomsen, B36. Myndin er frá heimadystinum ímóti B36 15. Mei, sum vit taptu 1-3.*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

**Prent:**
*Ítróttarfelag Fuglafjarðar*

**Uppseting:**
*Rógvi Róin*



# ? TAÐ NYTTAR EINKI HVAT VIT HALDA!

Í seinastu leikskrá, sum kom út fyri útvið tveimum mánaðaum síðani, hildu vit, at úrslitini og spælið seinastu dystirnar vístu, at nú bar rætta vegin. Men nú (greinin er skrivað 21. juli, orsakað av summarfrítíðini hjá blaðstjóranum) mugu vit staðfesta, at so var ikki. Eftir ein javnleik, og tríggjar sannførandi sigrar, steðgaði maskinan upp. Vit taptu stórt heima ímóti HB, og kunnu helst bert staðfesta, at vit framvegis ikki hava vunnið á HB komleksinum. Úrslitið gjørdist 1-4, sjálvt um vit høvdu meginpartin av spælinum. Men teir báðir veteranarnir á HB-liðnum, Gunnar Mohr í toppinum og Kaj Leo í hinum endanum vóru okkara monnum ov tungir at syfta.

Vikuskiftið aftaná var toppdystur í Vágunum ímóti vælspælandi felagsliðnum. Og her gekk eisini av skriðini. Talan gjørdist ongantíð um spennandi toppdystin, sum var væntandi. Vit vóru milt sagt ikki nóg góðir, og alt endaði við einum lemjandi ósigrim, við tennisúrslitinum 6-0.

Hesi bæði seinastu umførini áðrenn steðgin fær okkum bara at halda, at tað nyttar einki, hvat vit halda. Tað eru teir ellivu á vøllinum, teir á bonkinum og venjarin, sum hava seinastu avgerðina, ta alt kemur til alt. Tíverri, kanska. Tí fara vit ikki at ger okkum so øgiligar nógvar tankar um seinna umfar av landskappingini. Ikki leggja ov tungar byrðar á herðarnar, og heldur ikki skrúva vónirnar, um eitt gott kappingarár alt ov nógv upp. Vit fara heldur at seta okkara álit á tykkum á vøllum og kring liðið. Tó fara vit at loyva okkum at vísa á, at fyrstu dysturin í seinnu hálvu ímóti NSÍ í Runavík (sum varð leiktur síðsta vikuskiftið) kann verða avgerðandi.

Annars er at siga, at leikskráin í dag er nakað merkt av at vit eru í summarfrí, og ikki vera aftur fyrrenn í komandi viku. Hagtølini eru ikki dagførd. -Dystirnir seinasta vikuskiftið eru ikki við. Vit hava heldur ikki gjørt nógv burturúr skrivaða tilfarinum, men hava ístaðin valt at prenta forvitnis grein, sum stóð í Dimmalætting týsdagin 9. juli, har Pauli Jarnskor sigur sína hugsan um føroyskan fótbólt.

Annars ynskja vit øllum væl afturkomnum til dyst, og vóna, at tit fáa ein góðan dyst í dag, nú grannarnir úr Leirvík vitja.





*(framhald frá bls. 28)*
stillir í so langa tíð sum vit gera. Tí áttu vit at havt eina væl skipaða innandurafótbóltskappin g, so allir leikararnir eru í gongd. Verður kappingin skipað væl, er ikki neyðugt at tað fær avleiðingar fyri vetrarítróttargreinarnar, tí so nógvar ítróttarhallir eru kring landið, at við góðum skili átti tað at borið væl til, sigur hann.

### Mugu taka okkum saman

Samanumtikið heldur Pauli Jarnskor, at nógv er, sum kundi – og átti – at verði broytt í føroyskum fótbólti. Hann sigur hetta ikki fyri at gera seg inn á nakran, men hann sigur tað, tí hann heldur, at føroyskur fótbóltur, bæði tá tað snýr seg um landskappingina og tá tað snýr seg um landsliðið.

- Vit vilja so fegin vera við har tey stóru eru við, men fyri mær sær tað út, sum vit sjálvi vilja gera av, hvussu stór arbeiðsorka skal leggjast í arbeiðið. Tað ber kanska til her heima, men tá vit fara út í heim, ber ikki til longur. Um stutta tíð skal okkara landslið til Týskalands, har teir skulu spæla móti varaheimsmeistarunum, og tá eru tað ikki vit sum gera av, um tað er nóg mikið, sum vit gera, sigur Pauli.

Tí heldur hann tað vera av allarstørsta týdningi, at føroysku feløgini og Fótbóltssambandið seta seg niður fyri at finna út av, hvør ætlanin er við føroyskum fótbólti, og hvørja leið vit skulu ganga.

- Gera vit ikki tað, kann tað enda heilt galið, og tað er spell, tí vit hava bara okkum sjálvum fyri at takka, sigur Pauli Jarnskor at enda. Um støðan veruliga er so galin, sum Pauli vil vera við, fara vit at tosa við onnur um, meðan landskappingin er í summarfrí, og tí verður meira at frætta seinni í hesum mánaðinum.

**Svarini til spurningarnar á bls. 29:**
1. Yokohama og Pierluigi Collina úr Italia var dómari , 2. Týskalnd vann 8-0 ímóti Saudiarabia, 3. Málverjin hjá Týskland, Oliver Kahn , 4. Ahn Jung Hwan leikar við Perugia, 5. Brasilia, 6. Roger Lemerre, 7. Hakan Sukur úr Turkalandi í dystinum ímóti Suðurkorea, 8. Senegal tapti 0-1 ímóti Turkalandi eftir longda leiktíð, 9. Guus Hiddink úr Hollandi, 10. Luiz Felipe Scolari, 11. Joao Pinto úr Portugal, 12. Kina, Saudiarabia og Frakland, 13. Papa Bouba Diop úr Senegal í dystinum ímóti Fraklandi, 14. Anders Frisk úr Svøríki, Kim Milton Nielsen úr Danmark og Terje Hauge úr Noregi, 15. Hakan Unsal úr Turkalandi

**Ítróttarfelag Fuglafjarðar**
**Postboks 94**
**530 Fuglafjørður**
**Tel. 444 636**
**Fax 444 636**

***Aðalnevndin:***
Formaður
Hjalti Lundsbjerg, tel. 444 079
2. formaður
Jóhan Símun Joensen, tel. 224 224
Peningarøkil:
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052
Skrivari:
Høgni á Lakjuni, tel. 444 418

***Fótbóltsdeild:***
Formaður:
Símun Fornagarð, tel. 444 344 / 22 07 70
Ólavur Larsen, tel. 22 46 59
Mortan Nónsgjógv
Hildigarð Eliasen, tel. 444 052 / 25 38 52

***Samskipanarleiðari:***
Tel. 22 87 71

***Venjarar:***
***2. deild:***
Pauli Jarnskor, tel. 441 353
***3. deild:***
Ólavur Ellingsgaard, tel. 21 26 86
***4. deild:***
Eivin Breiðaskarð, tel. 21 40 03
***5. deild:***
*Kurt Petersen, tel. 22 37 99*
***Old Boys:***
Sonni Jensen, tel. 444 975
***Unglingar:***
Birgar Larsen, tel. 25 38 74
***Dreingir Ø.:***
Ólavur Larsen, tel. 22 46 59
***Smádreingir Ø.:***
John Thomsen, tel. 25 02 69
***Piltar 1/2 v a-b.:***
Ragnhard Petersen, tel. 444 353
***Smápiltar a-c:***
Jákup Baldvinsson, tel. 444 645
***Gentur:***
Jenny Niclasen, tel. 25 07 09
***Smágentur:***
Durita Djurhuus, tel. 44 50 24
***G.10-12 ár:***
Jóhan Símun Joensen, tel. 224 224
***Pinkur:***
Fríða Næss, tel. 26 09 72

# ÍF

# LÍF

1. Rúni Joensen
3. Pauli Jarnskor
4. Viggo Johannesen
5. Heini Heinason
6. Roy Róin
7. Eyðun Ryggshamar
8. Mortan Thomsen
9. Rúni Petersen
10. Høgni á Lakjuni
11. Eyðolvur R. Petersen
12. Bárður Mortensen
13. Tórstein Joensen, liðs.
14. Høgni Zachariasen
15. Hanus Eliasen
16. Fróði Poulsen
17. Hjalti Lundsbjerg
18. Høgni Madsen
19. Sverri Ellingsgaard
20. John Thomsen

Venjari: Pauli Jarnskor

Liðleiðari: Símun Fornagarð

____ Kartin Joensen
____ Ove Heinesen
____ Hjørleif Olsen
____ Tomek Resel
____ Tórhallur Justinussen
____ Áslak Jacobsen
____ Bárður Heinason
____ Jonhard Høgnesen
____ Tomek Przegylski
____ Petur Sjúrðaberg
____ Marek Wegiel
____ Terji Lervig
____ Sigfríður Olsen
____ Kristian í Vági
____ Jógvan Arnfinn Jacobsen
____

Venjari: Bogi Lervig
Hj. venjari:
Liðleiðari:

## Dómarabólkur:

Dómari:

## Bóltsponsorur: